

## Arktiskan sendiharra

Kanadiska stjórnin umhugsar at seta ein serligan sendiharra, sum skal arbeiða við ymsum arktiskum spurningum burturav. Starvið sum arktiskur sendiharri bleiv sett á stovn longu í 1994, men tað bleiv niðurlagt í 2006 orsakað av sparingum á fíggjarlógini. Tí hevur eingin verið í hesum starvinum síðani, men nú verður tað væntandi sett aftur, skrivar KNR. Orsøkin er, at áhugin fyri tí arktiska økinum er vaksin nógv tey seinastu árini, tí hildið verður fyri vist, at nógv olja og gass eru undir havbotninum í póløkinum.

# Kundu havt nógv størri samvinnu við bretar og írar



*40 ára gamli vestmenningurin Áki*

**Bretar og írar vilja fegnir hava størri samstarv við føroyingar og føroyski sendimaðurin í London ivast ikki í, at tað kann gagna øllum pørtum**

SAMVINNA
*Jan Müller/Árni Joensen*
*jan@ras2.fo*
*arni@sosialurin.fo*
*Myndir: Jan Müller*

Tað er alt ov lítið samband millum føroyingar og bretar og millum føroyingar og írar. Tað heldur føroyski sendimaðurin í London, Áki Johansen. Hann heldur, at sambandið kundi verið munandi størri á bæði tí politiska, handilsliga og tí mentanarliga økinum.

Í løtuni arbeiðir sendistovan serliga við at bøta um handilssambandið millum Føroyar og Bretland og millum Føroyar og Írland. Talan er um at økja handilin báðar vegir t.v.s. bæði innflutning og útflutning, og føroyski sendimaðurin í London er ikki í iva um, at føroyingar kunnu fáa væl burturúr størri samhandli við bretar og írar.

- Tann bretski marknaðurin er stórur, og vit halda ikki, at føroyingar leggja seg nógv eftir at keypa vørur hiðani. Størri innflutningur av bretskum vørum givið teimum føroysku brúkarunum eitt størri og meiri fjøltáttað úrval, sigur Áki Johansen við Rás2/Sosialin.



*- Økt samstarv við útlond kann vera ein sparing í sjálvum sær, sigur føroyski sendimaðurin, sum heldur tað vera neyðugt at hava eina sendistovu í Bretlandi. Áki Johansen her saman við Jóhan Dahl, landsstýrismanni uttanfyri føroysku sendistovuna*

### Mentan stóran áhuga

Ein partur av einum størri handilsligum sambandi millum Føroyar og Bretland og millum Føroyar og Írland kann koma á tí mentanarliga økinum. Eitt nú hevur sendistovan hjálpt føroyskum tónleiki at fáa fótafesti á bretska marknaðinum. Millum annað hevur sendistovan hjálpt Teiti Lassen við hansara fyrstu fløguútgávu á bretska marknaðinum, og eydnaðist átakið væl.

Bókmentir kunnu eisini fáa gagn av størri samhandli og samskifti við Bretland og Írland. Í hvussu er arbeiða tey á sendistovuni við einum átaki, har ætlanin er at fáa samband millum føroyskar, bretskar og írskar rithøvundar við tí fyri eyga at fáa bøkur týddar ímillum málini.

Írar vilja fegnir hava at vita, hvussu føroyingar hava megnað at varðveita tað føroyska málið, eins og teir hava áhuga í føroyskari mentan yvirhøvur. ìrskt er tað almenna málið í Írlandi, men tá írar koma saman, tosa teir vanliga enskt. Tað halda summir politikarar vera harmiligt, og nú vilja teir hava at vita, hvussu føroyingar hava varðveitt sítt mál.

Teir seinastu mánaðirnar hevur samband verið millum sendistovuna og írsku myndugleikarnar, og ætlan-